# Jacob Vestergaard
## – Hvør annar enn tú kann gera nakað við tálming hjá kommununum

JOHAN DAHL



Tórshavnar Kommuna einsamøll hevur avgjørt at hækka íløgurnar í høvuðsstaðin við 100 milliónum krónum komandi ár.

Íløgurnar fyri 2008 eru settar til 256 milliónir krónur. Í ár er talið 155 milliónir.

Til sammetingar er íløgukarmur landsins í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2008 - 210 mill +65 mill (flogvallaútbyggingin) = 275 millónir.

Niðanfyri er tikið brot úr samrøðu í Norðlýsinum 28.09.07

**Jacob Vestergaard sigur í samrøðu við Norðlýsið m.a.:**

”Eg havi ongar møguleika til at grípa inn móti Tórshavnar Kommunu”

”Hettar er ikki í tráð við tað sum eg og landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Magni Laksáfoss avtalaðu við kommunurnar – nevnuliga at royna at tálma.”

”Eg má tó staðfesta, at miðøkið er í ferð við at avlaga alt samfelagið.”

”Eg kann bara staðfesta, at komandi fíggjarlóg hjá Tórshavnar kommunu bert er ein staðfesting av, hvussu óvjant livikorini eru hjá borgarunum í ymisku økjunum í landinum.”

”Við at hækka íløgurnar heilar 100 milliónir krónur komandi ár er Tórshavnar Kommuna beinleiðis við til at gera skeivleikarnar í samfelagnum uppaftur størri, sigur Jacob Vestergaard landsstýrismaður í kommunumálum”

Eg eri samdur við J. Vestergaard í flestu av hansara niðurstøðum, tó má eg ásanna, at um ikki landsstýrismaðurin sum umsitur kommunumál ikki kann gera nakað við hendan fíggjarliga ørskap, so er nakað púra galið.

Ein kommuna eigur ikki at kunna hóvreiggja sær á tann hátt, sum Tórshavnar Kommuna ger, púra hensýnsleyst er hon við at kóka alt samfelagið upp, alt meðan tað frá landspolitiskari síðu verður gjørt eitt stórt arbeiði fyri at tálma, minka um íløgur og rakstur – hetta hóast stórur partur er lógarbundnar játtanir á rakstrarsíðuni.

Ongin kommuna skal krevja meira inn í skatti enn tað sum skal til at fíggja kommununa.

Hevur Tórshavnar kommuna kravt 160-180 mill og nógv inn yvir ár og sett í tiltaksgrunn ella á konto, so hevur hon kravt ov nógv inn og eigur minka skattaprosentið.

Innlendismálaráið eigur at kanna, um kommunan hevur kravt ov nógv inn í skatti, tí tað er væl tað sum er orsøk til at ein kommuna kann spara 100 tals milliónir á konto ella í tiltaksgrunn.

Eisini eigur innlendismálaráðið at fara inn og meta um skattaprosentið í mun til uppgávurnar kommunan hevur.

Landsins myndugleikar eiga at kunna stýra við skili, men tað verður truplult, um neyvt fíggjarligt eftirlit við kommununum er møguligt.

Eisini eigur landið at kunna áseta íløguloft hjá kommununum, hóast tær ikki skylda nakað, hetta má endurskoðast skjótast.

**Hvør skal hava fíggarliga eftirlitið?**

Eg meti ta er skeivt, at tann kommunali fíggjarligi parturin er undir ábyrgd hjá landsstýrismanninum í innlendismálum, men eigur sjálvsagt at verður undir landsstýrismanninum í fíggjarmálum, og stýringsamboðið eigur at verða ein samankoyrd skipan, soleiðis at neyvari eftirlit kann verða við nýtslu kommununar.

**Landið innkrevja allan skatt og síðan býta út?**

Tað skuldi eisini verið umhugsað als ikki at havt kommunuskatt- men at landið kravdi allan skatt inn og deildi so útaftur eftir nærri ásettum frymli sum gjørdi, at kommunueindirnar allar vildu verið meir líkastillaðar við tænastum til sínar borgarar.

Sum er, er tað bert ein og tað er Jacob Vestergaard sum umsitur og ásetur kommunalu karmarnar og hevur eftirlitið við teimum.

Einans Jacob Vestergaard kann forða fyri, at kommununar fara yvir gevind við rakstrarkostnaðum og íløgum og eigur at forða fyri, at kommunurnar ikki verða tær, sum koma at avlaga og hita búskapin enn meira upp, og tí havi eg ilt við at skilja hansara útsøgn í Norðlýsinum - nú eisini endurgivið á Portalinum.

Mín áheitan á Jacob er at leggja seg í selarnar og vísa, at Fólkaflokkurin sum í samgonguni hevur komunurnar um hendi eisini veruliga vil arbeiða fyri tálming og ikki sleppur púra leyst við at geva kommununum frítt slag.

# Hattin av fyri Sunda kommunu

ELSA BIRGITTA P. PETERSEN
skúlastjóri, Hvalba



Viðmerking til grein í Sosialinum nr. 184 mánadagin 24. september 2007

Undir yvirskriftini “Raðfesta skúlan ovarliga”, skrivar blaðmaðurin, Leo Poulsen, at Sunda kommuna hevur gjørt av at raðfesta undirvísingina í barnaskúlanum sera ovarliga.

Síðani verður skrivað, at Sunda kommuna setur nógvar pengar av til telduútbúnað, ja, heilt nógvar pengar sammett við aðrar kommunur, og lesarin skilir eisini, at Sunda kommuna hevur eina langtíðarætlan í samband við telduútbúnað. Frálíkt!!

At lærararnir eisini fáa eina arbeiðsteldu hvør, er eitt ynski, sum lærarar í føroyska fólkaskúlanum hava havt í nógv ár, og tað vísir, at Sunda kommuna respekterar arbeiði hjá lærarunum.

Skrivað verður eisini, at Sunda kommuna setur nógvar pengar av til rakstur av barnaskúlunum. Nevnt varð, at 4.700 kr verða settar av til hvønn næming í teimum størru skúlunum og 7.000 kr í teimum báðum minstu skúlunum. Tá rokni eg, sum áhugaður lesari av greinini, við, at hetta er tann puljan tann einstaki skúlin fær til nýtslu. Vask, el, hiti og umvælingar eru ikki við.

Brotini sum grundgeva fyri, hví Sunda kommuna raðfestir skúlan so ovarliga, eru hesi: “Ynski er at skapa fortreytir við barnaskúlarnar í kommununi soleiðis, at lærararnir veruliga merkja, at økið verður høgt raðfest”.

Og “Vit meta, at hetta er ein góð skipan, sum gevur lærarunum størri ábyrgd og økir um áhugan hjá teimum fyri starvinum”.

Hetta boðar frá einum positivum hugburði mótvegis lærarunum og gerandisdegi skúlans, og eg eri sannførd um, at tað gevur lærarum hug at søkja størvini í skúlunum í Sunda kommunu. Teirra arbeiði verður jú virt, og eg eri eisini sannførd um, at tað gevur foreldrum at skúlabørnum góðan hug til at flyta til kommununar norðuri í Sundalagnum.

Eina útsøgn frá formanninum í Sunda kommunu vil eg tó seta spurnartekin við, og hon er: At tað altíð er óheppið, at ábyrgdarbýtið millum land og kommunu er tvídeilt.

Ja, um allar kommunur í Føroyum høvdu sama hugburð, sum Sunda kommuna, vóru positivar mótvegis skúlanum, vildu spandera nógvar pengar og orku upp á skúlan, næmingarnar og lærararnar, vóru proaktivar, so hevði hetta kanska verið rætt, og so hevði mótstøðan frá skúlafólki móti at leggja skúlan út til kommunurnar kanska ikki verið so stór.

Men vit vita, at soleiðis er verunleikin ikki.

Vit vita eisini, at kommunustýrir skifta, soleiðis at tey, sum vóru positiv í fýra ár, væl kunnu vera negativ í fleiri enn fýra fylgjandi ár, alt eftir hvør mannar kommunustýrini. Og tá verður alt niðurbrotið, sum bygt varð upp.

Vit vita, at í heilt nógvum kommunum í Føroyum er tað soleiðis, at skúlaleiðslurnar skuldu liggja á knøum fyri at fáa pengar til rakstur og harumframt mugu argumentera fyri deyvum oyrum um forbetringar til skúlan hvørt einasta ár.

Vit vita tíverri eisini, at nógvar kommunur ikki hava ein skúlapolitik.

Aðrar kommunur skulu hálast í gongd. Látast ikki um vón fyrr enn vindeygu rotna, og takið er sum ein sold.

Fakhølir eru frá Metusalemsa tíð, og tá víst verður á tað, er svarið: “Tað var gott fyrr, tað má vera nóg gott nú. Vit pjøssa eitt sindur upp á tað, so heldur tað kanska inntil næsta val”.

Skúlagarðarnir eru gamlir, frá tí tíðini vit stóðu í røðum uttan fyri eftir hvørt fríkorter og bíðaðu eftir lærаranum. Ongin hugni hvørki úti ella inni, og tað, sum verri er hesum viðvíkjandi, hetta umhvørvið er ein innbjóðing til happing.

Nógv verður gjørt burtur úr trivnaðinum í fólkaskúlanum í hesum døgum, men felagshølini í nógvum skúlum eru snøgt sagt ikki nøktandi, um nøkur felagshølir yvirhøvur eru.

Fyrireikingar-og fundarhølir til lærararnar mangla eisini á flestu skúlum í Føroyum. Líka sum teldur til hvønn lærara, hevur hetta verið eitt ynski í nógv ár, so lærarar kunnu arbeiða í millumtímunum og kanska gera seg lidnar fyri fyrireikingararbeiði, áðrenn farið verður heim eftir loknan arbeiðsdag.

Nógvir skúlar eru gamlir, men um man hugsar um tær lógarbroytingar, sum eru gjørdar á skúlaøkinum, tær broytingar í undirvísingarkrøvunum og tær nýggju lærugreinirnar, sum eru komnar inn í fólkaskúlan, síðani hesir skúlar vórðu bygdir, má niðurstøðan vera, at meginparturin av føroysku kommununum mugu taka sær um reiggj.

Føroysku kommunufeløgini mugu gera sær greitt, at áðrenn kravið um, at alt skúlaverkið skal leggjast út til kommunurnar at umsita, verður sett, má tað, sum kommunurnar longu nú umsita, verða væl røkt og nútímansgjørt. Fyrr enn tað er í lagi, kann ongin taka undir við, at føroysku kommunurnar eisini fáa ábyrgd av tí partinum av skúlaverkinum, sum Mentamálaráðið umsitur.

Og vit, sum minnast aftur til tað tíðina, kommunurnar umsótu alt, mugu ávara ímóti, at “sporene skræmmer”.

Men Sunda kommuna skal hava tað rós, sum hon hevur uppiborið, tí hon raðfestir skúlan høgt.

# Eingin heilsuápustul, men-men…..

BERGTÓRA HØGNADÓTTIR JOENSEN

Veit ikki hvussu er við tær, ført tú 6 um dagin? Mælt verður til, at vaksin eta seks fruktir og/ella grønmeti, meðan børn eiga at eta tríggjar. Hoyrdi tíðindasendingina mikukvøldið. Hetta við at sukurløgir og slíkt skuldu gerast dýrari. Lutvís til tess at fáa nakrar eyka krónur í landsskassan og lutvís, so fólk skuldu eta minni av tí, sum hevur eitt høgt sukurinnihald. Pál Weihe, formaður í Fyribyrgingarráðnum greiddi væl frá fyrimunum og vansum við hesum. Hóskvøldið greiddi Hans Pauli Strøm frá, at gott hevði verið at fingið frukt og grønt MVG-frítt, men at tað ikki var gjørligt júst nú.

Fegnist um heilsurenning, roykfrítt umhvørvi osfr, og eisini um góðu intentiónirnar um at gera frukt og grønt MVG-frítt. Tíverri verður sagt, at tað ikki ber til at gera tað bíligari, tí at ynski ikki er um at hava frávik í MVG-lógini.

Eg haldi, at um ein veruliga skal “sláa seymin á høvdið” og nakað munagott skal spyrjast burturúr hesum átøkum, sum í fleiri førum hava rós uppiborið, er alneyðugt at frukt og grønmeti gerst bíligari. Prísurin ER púra órímiligur á fruktum og grønmeti. Serliga – men ikki bert – tá talan er um vistfrøðiligar fruktir og grønmeti. Meini so við: 1 kg av vistfrøðilgum gularótum fyri 19,95 kr!!

Haldi, at tað kundi verið sera ’politiskt korrekt’ at frukt og grønmeti lækkaði nakað í prísi, og serliga tað vistfrøðiliga, tí tað er jú eisini umhvørvinum at gagni.

Og so nakað heilt annað, sum kanska heldur er eitt ynski til handlarnar. Ber ikki til at fáa nýggjar fruktir og grønmeti tvær ferðir um vikuna – td. týsdag og fríggjadag? Kann ikki vera rætt, at tað stórt sæð er ógjørligt at finna tilfar til eina salat, um ein fer til handils leygardag. Einasta brúkiliga grønmeti, tú tá ført hendur á, er hvítkál, gularøtur og kanska onkur hendinga sitron.Varð einaferð ringd upp fríggjakvøld, biðin um at gera tvær stórar og leskiligar skálir av salati til sunnudag. TAÐ var nakað av einari avbjóðing!!!

Nú eg eri í holt við handlarnar, gótt í tykkum, kunnu tit ikki royna í størri mun eisini at hava frukt og grønmeti sum tilboðsvørur? Tað tykist mær sum tilboðini aloftast eru sodavatn, kips og pitsur.